# Nógv sild í Skagerak

Donsk skip hava fingið nógva sild í Skagerak í seinastuni. Fiskeri Tidende skrivar frá skiparanum Erik Rasmussen, sum greiðir frá, at teir fingu 180 tons eftir hálvum triðja tíma. Hann hevur frætt um eitt svenskt, sum fekk 300 tons eftir einum hálvum tíma. Um støddina sigur hann, at tað fóru millum 120 og 150 sildir til 10 kilo. Danski skiparin sigur seg hava frætt frá skipum, sum hava borið við sild allan vegin niður ígjøgnum Norðsjógvin eisini, og tað samsvarar ikki við tað, sum fiskifrøðingarnir hava sagt, sigur hann.



# Ikki mest at gera á MEST

**- Vit kundu saktans havt meira at gera, men eg vóni, at meira virksemi verður, sum tíðin nærkast jólum, sigur Mouritz Mohr, rakstrarleiðari á MEST**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á bedingunum í Havn, Skála og Vestmanna hevur ikki verið nógv virksemi seinastu tíðina.

- Vit hava nakað at gera alla tíðina, men sum er hava vit saktans pláss fyri meira.

Mouritz Mohr, rakstrarleiðari, sigur, at lítið og einki virksemi er í Vestmanna, men nakað er alla tíðina í Havn, Skála og Runavík.

- Sum heild kundu vit tikið fleiri uppgávur á okkum í løtuni, og eg vóni, at meira aktivitetur verður so hvørt, vit nærkast jólum.

Hann vísir á, at MEST, sum eisini fevnir um fyrrverandi FJM í Runavík, tilsamans er ein stór fyritøka við umleið 300 arbeiðsfólkum, og tí skal nógv til, um øll skulu hava nóg mikið fyri hendurnar.

## Boriflaki til Íslands

Á MEST í Havn og Skála snýr meginparturin av virkseminum seg um ymiskt umvælingararbeiði av skipum.

- Í Havn byggja vit eisini ein boriflaka til íslendskt felag. Hesin verður væntandi liðugur og fer yvir til Íslands við farmaskipi um mánaðarskiftið november/desember.

Mouritz sigur, at Christian í Grótinum í løtuni stendur í dokkini á Skála, har hann verður gjørdur klárur til ferðina yvir til Kili, hagar hann er seldur.

- Vit hava eisini tveir russar við bryggju á Skála, harav annar fer í dokkina, tá Christian í Grótinum er liðugur, sigur rakstrarleiðarin.

## Eingin nýbygging

Síðan MEST á Skála varð liðug við seinna nýbygningin hjá Thor í Hósvík, Thor Omega, hevur MEST ongan sáttmála um nýbygging.

- Í Havn hava vit eisini smíðað tvær tvíkiljur sum alibátar til Vestlaks, men í løtuni er eingin slíkur sáttmáli heldur.

Mouritz Mohr sigur annars, at arbeiði við nýggju bedingini á Skála ætlandi verður liðugt um mánaðarskiftið november/ desember.

- Tá bedingin verður klár at taka í nýtslu aftur, kunnu vit taka skip upp, sum í mesta lagi eru 1500 brt. stór, sigur rakstrarleiðarin.



*Í gjár stóð einki skip uppi á bedingini hjá MEST í Havn og rakstrarleiðarin, Mouritz Mohr, ásannar, at meira kundi verið at gjørt, enn tað er í løtuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

MEST á Skála hevur gjørt eina íløgu í nýggju bedingina.

## MEST fellir væl

Vit spurdu eisini Mouritz, hvussu hann heldur, at nýggja navnið hjá fyrrverandi Tórshavnar Skipasmiðju riggar.

Undir hattinum hjá skipasmiðjuni eru eisini fyrrverandi skipasmiðjan á Skála, bedingin í Vestmanna og FJM í Runavík. Nú verða øll støðini rópt MEST – og so staðarnavnið aftrat.

- Jú, eg haldi, at hetta hevur riggað rímiliga væl.

Mouritz Mohr ásannar kortini, at neyðugt er at hugsa seg um hvørja ferð, telefonin verður tikin, so rætta navnið verður sagt – MEST.

- Alt nýtt krevur tilvenjing, men eg trúgvi, at vit við tíðini fara at venja okkum við navnið, leggur hann aftrat.

# 154.000 tons av toski landað í Noregi



*Toskaveiðan undir Føroyum, sum í løtuni er á søguliga lágum støði, kann ikki samanberast við norsku toskaveiðina, ið er fleiri ferðir so stór*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Útróðrarbátar, sum eru millum 11 og 15 metrar langir, hava landað sløk 29.000 tons, sum er meira enn tað tvífalda av allari toskaveiðini undir Føroyum í 2008**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært hagtølum hava norsk fiskifør higartil í ár landað tilsamans 154.000 tons av toski.

Í bólkinum fyri skip og bátar, sum eru minni enn 28 metrar til longdar, eru tað serliga bátar millum 11 og 15 metrar, ið hava landað tær størstu nøgdirnar. Hesir hava nevniliga landað 29.593 tons av toski tilsamans í ár.

Hetta merkir, um vit siga tað við øðrum orðum, at norski útróðrarflotin longu higartil í ár hevur fiskað meira enn tvífalt so nógv av toski, sum øll toskaveiðan undir Føroyum var í 2007.

Trolaraflotin, sum er størri enn 21 metrar, hevur landað tilsamans 40.702 tons av toski higartil í ár.

Taka vit øll tølini yvir toskalandingar í Noregi higartil í ár og leggja tey saman, er talan um eina samlaða nøgd, sum svarar til 154.000 tons.

Tað er FiskeribladetFiskaren, sum ber hesi tíðindi á síni heimasíðu.